## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og norði og sólglottar, men eisini okkurt kavæælið. Hitalagið millum frostmarkið og ÷3 stig, um náttina niður í ÷6 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði, um kvøldið minni vindur. Sólglottar, men kanska okkurt kavaælið, serliga norðanfyri. Hitalagið millum ÷4 og ÷7 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Hvassur vindur ella skrið av norði og kavaælingur. Hitalagið millum ÷3 og ÷6 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Upp í hvassan vind av landnyrðingi og norði og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷2 og ÷6 stig.



*Jens Kr. Vang*

# Myllan í Mattalág aftur mylla

FORNMINNI

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

»Betur er ein bøtandi hond enn ein…« sigur orðatakið og nú verður bøtt um í vakra blettinum við ánna í Mattalág, har ein virkin havnamaður, Sámal í Mattastovu fyri hundrað árum síðani legði fyrsta steinin til eina myllu.

Sámal búði ongantíð í Mattalág. Hann búði úti á Reyni, men hann sá máttin hendan áin átti og hann vildi temja hendan, soleiðis at hann kundi mala brúngult korn um til fínasta mjøl. Hann vildi sum myllari mala fyri fólk.

Føroyar er kargt landbúnaðarland og hava ongantíð sjálvar verið førar fyri at breyðføða føroyingar við korni. Tað hevur altíð verið neyðugt at innflyta naka. Og korn er malið í Mattalág í mong ár. Men seinastu mongu árini hevur onki slíkt virksemi verið í Mattalág. Mjølið er komið liðugt malið, fyrst í sekkjum og síðan fínt innpakkað í tvey til tíggjupundspakkar.

Og myllan hevur staðið, tíðarinnar tonn hevur brýnt av henni. Og hon hevur hýst skapandi børnum, sum í leiki hava kent myllluna, gran og lerkatrøini kring hana, sum ein svalandi dreymaheim. Seinasta høggið fekk hon fyri árum síðan, tá eldur herjaði í henni.

Nú hava vælmeint fólk í Havn tikið seg saman og sett mylluna í stand. Og mikudagin varð nýggja mylluhjólið, sum er tilvirkað á Tórshavnar Skipasmiðju, sett uppaftur. Myllan í Mattalág er aftur vorðin ein mylla.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | – |
| Nuuk | ÷6 |
| Qaqortoq | ÷3 |
| Ammassalik | ÷10 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 10 |
| Tromsø | ÷2 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | ÷14 |
| Moskva | ÷5 |
| Berlin | 6 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | ÷1 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 11 |
| Róm | – |
| Malorca | 16 |
| Athen | 10 |
| Malta | 14 |
| Tunis | – |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 23 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 26 |
| Sydney | – |
| New York | 3 |
| Miami | – |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 34 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 991 hPa. eystan fyri Ísland fer móti Norðsjónum og dregur kalda luft av norði móti Føroyum.




Lágtrýstið við Lofoten stendur mestsum í stað, so tað kalda høgættarákið stendur við her hjá okkum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/02 kl. 06[00]–22/02 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 2,0°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

### AVFALL




Avfallið: 0,4 mm – mált frá 21/02 kl. 06[00]–22/02 kl. 06[00]
Avfallið higartil í februar: 102,0 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

20. febr.: Mánin longst frá jørðini
23. febr.: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. feb. | 06:54 | 19:14 | 05:54 | 18:14 | 06:09 | 18:29 | 08:54 | 21:14 | 09:54 | 22:14 | 05:09 | 17:29 | 04:09 | 16:29 | 07:09 | 19:29 | 08:09 | 20:29 | 06:39 | 18:59 | 07:54 | 20:14 |
| 24. feb. | 07:34 | 19:54 | 06:34 | 18:54 | 06:49 | 19:09 | 09:34 | 21:54 | 10:34 | 22:54 | 05:49 | 18:09 | 04:49 | 17:09 | 07:49 | 20:09 | 08:49 | 21:09 | 07:19 | 19:39 | 08:34 | 20:54 |
| 25. feb. | 08:12 | 20:30 | 07:12 | 19:30 | 07:27 | 19:45 | 10:12 | 22:30 | 11:12 | 23:30 | 06:27 | 18:45 | 05:27 | 17:45 | 08:27 | 20:45 | 09:27 | 21:45 | 07:57 | 20:15 | 09:12 | 21:30 |
| 26. feb. | 08:48 | 21:07 | 07:48 | 20:07 | 08:03 | 20:22 | 10:48 | 23:07 | 11:48 | — | 07:03 | 19:22 | 06:03 | 18:22 | 09:03 | 21:22 | 10:03 | 22:22 | 08:33 | 20:52 | 09:48 | 22:07 |

www.sosialurin.fo